# Fundarbók hjá Vestmanna Bygdarráð.
# Bygdarráðsfundur tann 22. apríl 2008, kl. $19^{00}$.

**Bygdarráðslimir á fundi:** Karl A. Olsen, Jón Mikklesen, Øssur Christiansen, Regin Nielsen og Marjun S. Olsen.
**Skrivari**: Jákup Durhuus.

---

Vísandi til grein 18, stk. 2, í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri hevur Pauli T. Petersen boðað frá, at honum berst frá møta á fundinum, og at tiltakslimur fær fundarboð í hansara stað.

Fyrsti og annar varalimur, Jógvan Emil Nielsen og Páll Hellu, verða burturstaddir.

Triði varalimur, Regin Nielsen, hevur fingið fundarboð um telefon tann 21. apríl 2008.

Sambært grein 18, stk. 3, í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri, skal kommunustýrið gera av, um treytirnar fyri inn-kalling av tiltakslimi eru loknar.

Bygdarráðið samtykti einmælt at góðkenna innkallingina av Regin Nielsen sum varalimi.

Jóhan Hendrik Hansen og Jákup Oluf Hansen boðaðu seinnapartin frá, at tað ikki ber til hjá teimum at møta á fundinum. Skotbráið var ov stutt til tess at innkalla varalimir fyri teir báðar.

Til viðgerðar fyri **opnari hurð:**

**Mál 24.**
Tilmælir frá Teknisku Nevnd til ynski frá Jóhan Jákup Vørmadal, umsjónarmanni, um amboð, sum kundu gjørt, at teir koma at arbeiða skjótari og høvdu møguleikan at gera smærri arbeiðir, sum teir hava trupult at gera í dag, og sum eru ov smá at bjóða út.
J. nr. 2005-555
Ein meiriluti, Jón Mikkelsen og Øssur Christiansen, mælir til at geva loyvi til at keypa eina mini beltmaskinu uppá uml. 1662 kg fyri 194.500 kr, brekkara og anhangara til maskinuna fyri ávika-vist 35.800 kr og 26.000 kr og ein mini dumpara, sum lastar 800 kg, fyri 48.796,25 kr - alt uttan mvg.
Ein minniluti, Pauli T. Petersen, mælir til at beina málið í Fíggjarnevndina til tess at meta um møguligt er at gera íløguna í ár.

**Viðv. 24.**
Tilmælið samtykt við 4 atkvøðum fyri og ongari ímóti. Marjun S. Olsen atkvøddi blankt.

**Mál 25.**
Tilmæli frá somu til munnligan fyrispurning frá íbúgvum á Heygum um møguleikan fyri at fáa veg til ognir teirra.
J. nr. 2005-603
Nevndin mælir til at geva loyvi til at gera 3 metrar breiðan veg á kommunalum øki niðanfyri gøtuna á Heygum, men at íbúgvararnir, sum fáa beinleiðis ágóða av vegnum, sjálvir gera og fíggja arbeiðið.

**Viðv. 25.**
Marjun S. Olsen setti fram uppskot um, at kommunan fíggjar tann partin av vegnum, sum er á kommunalum øki.
Uppskotið varð felt við tveimum atkvøðum fyri og tveimum ímóti. Karl A. Olsen og Marjun S. Olsen atkvøddu fyri og Jón Mikkelsen og Regin Nielsen atkvøddu ímóti. Øssur Christiansen atkvøddi blankt.
Tilmalið samtykt við 4 atkvøðum fyri og einari ímóti. Marjun S. Olsen atkvøddi ímóti.

**Mál 26.**
Tilmæli frá somu til notat frá Karl A. Olsen, borgarstjóra, í samband við munnligan fyrispurning frá Heina á Heygum um møguleikan fyri at seta húsvognar á planerað øki nakað niðan-fyri vatnbyrgingina í Bjarnadali, og at kommunan í hesum sam-bandi fínplanerar økið.
J. nr. 2005-632
- notat frá Karl A. Olsen, borgarstjóra, í samband við munn-ligan fyrispurning frá Heina á Heygum um møguleikan fyri at læna/ leiga wc-skúrin í samband við omanfyri nevndu ætlan.
- teldupostur/umsókn frá ATV-Mountain um loyvi til at læna/leiga wc-skúrin til ferðavinnuvirksemi teirra Inni á Fjørð.

Treytað av, at friðingarmyndugleikarnir góðkenna ætlanina, mælir nevndin til
- at geva loyvi til at seta í mesta lagi 3 húsvognar á økinum
- at saniteru viðurskiftini verða lýst nærri
- at kommunan einki ger við planering av økinum
- og møguliga aðrar treytir.

Nevndin mælir til ikki at læna ella leiga wc-skúrin út.

**Viðv. 26.**
Málið varð tikið av skránni.

**Mál 27.**
Tilmæli frá somu til fyrispurning frá Rólant Isaksen um kommunan er áhugað at keypa ogna hansara matr. nr. 45m - sethúsaøki uttan-fyri Hórðará til víddar 325 $m^2$.
J. nr. 2005-154
Nevndin mælir til at keypa ognina fyri 250,- kr/$m^2$.

**Viðv. 27.**
Tilmælið einmælt samtykt.

Øssur Christiansen var ikki við til vigerðina av máli nr. 28.

**Mál 28.**
Tilmæli frá Mentunarnevndini til innkomin tilboð uppá máling av Ungdómshúsinum "Staðið".
J. nr. 2005-626
Biðið er um tilboð frá Øssur Christiansen, Una Zachariassen og Una Nielsen, málarameistarum.
Tá freistin var úti kl 12 í dag, var bert eitt tilboð innkomið. Hetta var frá Øssur Christiansen.
Harafturat hevði Steingrím Haraldsen av sínum eintingum latið tilboð inn.

Nevndin mælir til at taka av tilboðnum frá Øssur Christiansen uppá 190.338,- kr íroknað mvg.

**Viðv. 28.**
Tilmælið einmælt samtykt.
Marjun S. Olsen vildi hava viðmerkt, at arbeiðið átti at verið bjóða út alment. Í hvussu so er, átti Vestmanna Skipasmiðja eisini at havt verið boðin við.

Øssur Christiansen komin aftur á fundin.

**Mál 29.**
Umhvørvisátakið 2008.
J. nr. 2005-638

**Viðv. 29.**
Einmælt samtykt at melda Gjógvaráætlanina hjá Lokala Agenda-felagnum til Umhvørvisátakið 2008 undir greinini "besta átak".

Bokin lisin

Fundur lokin kl. $21^{15}$.